# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Einki svar kring Williambrunn

Tað eru nú fjúrtan dagar síðani, at spurningar vórðu settir leiðsluni í Jarðfeingi í analysu í hesum blað. Teir snúðu seg allir um seinastu boringina á landgrunninum, Williambrunnin, sum BP varð fyristøðufelag fyri. Heitt varð á Jarðfeingi um at greiða frá, hví ikki varð borað longur niður.

Í hesi grein og analysu varð stórt spurnartekin sett við seinasta sáttmálan, sum gjørdur var millum oljufeløg og so føroyskar oljumyndugleikar. Mett varð at her varð farið frá vanligum praksis, har oljufeløg binda seg til at bora niður á ávíst dýpi til at tvinna ávíst dagatal uppí. Hóast spurningarnir vórðu rættiliga ítøkiligir og hóast róð varð framundir, at tað besta, sum Jarðfeingi kundi gera, var at spæla við opnum kortum tvs. at kunna almenningin um tað, sum farið er fram í sambandi við hesi seinastu boringina, so hevur Jarðfeingi eftir øllum at døma valt ikki at úttala seg ella í heila tikið at gera viðmerkingar til umrøddu grein í Sosialinum. Eisini hava hesir somu spurningar verið uppi at venda í Rás2. Men heldur ikki har fekst nakað ítøkiligt svar.

Sosialurin og Rás2 hava biðið um alment innlit í sáttmálasamráðingarnar, tí vit meta hetta vera so prinsipielt mál eitt nú fyri framtíðar sáttmálar og leiting, men heldur ikki har ber til at koma ígjøgnum. Talan er um upplýsingar, sum eru fortróligir millum viðkomandi oljufelag og so føroysku myndugleikarnar er svarið.

Tað kann sjálvandi forsvarast til eitt vist, at ikki smálutir í sáttmálum koma út til almenningin. Men tá mugu vit so eisini kunna hava álit á okkara samráðingarfólkum, at tað besta er gjørt sæð frá okkara síðu. Tað vita vit ikki í dag. Tí tað besta og helst eisini mest rímuliga var, at feløgini, sum løgdu tveir brunnar saman í ein, boraðu djúpri.

Spurningurin, sum reistur er, er einfaldur: hví boðaði BP undan boringini frá, at borast skuldi niður á 4750 metrar, men tá avtornaði varð "bara" borað niður á 3350 metrar. Her resta sostattt umleið 1400 metrar í. Um vit ímynda okkum, at borað varð longur niður, so vildi vitanin, sum fekst har, verið sera týdningarmikil og nógv verd fyri Føroyar og fyri framtíðar leiting.

Nú um dagarnar fræittist, at fyrrverandi stjórin í Jarðfeingi, sum helst var hann, sum sat við borðendan, tá avtalan varð gjørd við BP, og hevur havt farloyvi frá sínum starvi, nú er settur í starv hjá oljufelag. Uttan at vit kunnu staðfesta nakran illgruna, so reisir spurningurin seg, um hetta starvsskiftið kann hava nakað við BP-avtaluna at gera. Vit velja at halda, at tað hevur hetta ikki, tí táverandi stórin gjørdi eitt stórt og gott arbeiði á Jarðfeingi.

Men eftir stendur ósvaraði spurningurin: hví mistu vit tvs. okkara oljumyndugleikar heilar 1400 metrar av boring á gólvið. Og fer hetta at skapa presens fyri komandi sáttmálasamráðingar við oljufeløg, sum kunnu hugsast at vilja fáa somu "sømdir" sum seinasta boringin møguliga er tekin um.

**Sosialurin**

## Heildin er meiri víðfevnd

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Hóraldur Joensen fellur bæði órættan og heldur harðan dóm, tá hann einfalt sigur, at okkara hugburður ger, at okkara unga fólk ikki kemur heimaftur og sum hann tekur til: "Stygd heiman av neiligum hugburði og eitrandi orðavali"**

Á Grækarismessu hevði eg í Dimmalætting grein undir heitinum: "Føroyingar ilt við at koma aftur", har eg vísti á nakrar veruleikar bæði negativar og positivar, samstundis sum eg ávaraði ímóti gykli og fyrigykli av samfelagsmenningni við suggesjónsgeyli uttan próvførslu.

Helt fyri, at umráðandi er, at vit fáa føroyingar heimaftur, sum kunnu geva samfelagi okkara nakað, og sum eg m.a. tók til, at, "hesi ikki bara gerast uppáhang hjá almenna sektorinum, men økja um okkara vinnu og útflutning, tí heimamarknaðurin er avmarkaður"!

Hetta fær Hórald Joensen, granskingarleiðara á Granskingarkjarnanum í evnafrøði og lívtøkni, Lektara á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya til í greinum, og sum eg skilji eisini í fyrilestri at gera ta niðurstøðu, at: ".. Tað er undranarvert, at ein av fyrrverandi leiðandi monnum landsins kallar øll tey, sum ikki beinleiðis økja um vinnu og útflutning okkara, fyri uppáhang hjá almenna sektorinum. Hesi fólk, sum ikki arbeiða í høvuðs- og framleiðsluvinnuni, eitt nú fólk í heilsuverkinum og undirvísingarverkinum, eru altso sníkar samfelagsins....!

**Tendensiøs niðurstøða**

Tað kann tykjast løgið, at granskingarleiðari fer so lætt um heildina og ikki hyggur út fyri dyr ella kanska heldur longur út.

Henda tendensiøsa og villleiðandi - ja næstan politiska - niðurstøða hansara um heildina í grein míni er uttan iva sprottin úr heldur løgnu sjónvarpssendingini um at fáa livrina til høldar, har granskarin Hóraldur Joensen so lætt og elegant fær 2 mia. krónur burtur úr livrini, um bert sjómenn og vinnulívsfólk gjørdu sítt arbeiði.

Sjálvur vísti eg bert á, hvat stjórin á Faroe Marine Biotech helt fyri bæði við sínum egnabrá og síðani við orðum, og tað sum kendi og royndi sjómaðurin og skiparin vísti á við mongdini av livratøku.

Út frá grein Hóralds verður helst neyðugt við fleiri viðmerkingum frameftir!

Hann fellur bæði órættan og heldur harðan dóm, tá hann sigur, at okkara hugburður ger, at okkara unga fólk ikki kemur heimaftur og sum hann tekur til: "Stygd heiman av neiligum hugburði og eitrandi orðavali".

## Rættur áttatiárapolitikkur

JZAKARIAS WANG



Í mong ár hevur verið ført fram at áttatiárini vóru ein vill tíð, og alt tað, sum tað almenna gjørdi í teimum árum var skeivt. Serliga er tað landsstýrið, ið sat frá 1985 við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, sum hevur staðið fyri skotum.

Einki er at ivast í, at tá vóru mong mistøk gjørd, men hetta hevur eisini í ein ávísan mun skuggað fyri teimum røttu avgerðum, sum tiknar vóru í hesum árum.

Tað var rætt at satsa upp á útbygging av undirstøðukervinum, so at vit fingu vegir millum bygdir og tunlar. Somuleiðis var tað rætt at fara undir at gera Vesturtunnilin uttan tunnilsgjald.

Tíverri støðgaði danska stjórnin hesum skilagóða tiltaki, og tá vit í nitiárunum fóru undir at gera Vesturtunnilin, varð skipanin tann, at vit áløgdu teimum, sum skulu nýta hann, eitt ávíst nýtslugjald.

Hetta er ein tápulig skipan, tí hon ger, at nøkur aftra seg við at nýta tunnilin, og samfelagið fær tí ikki so nógv gagn burtur úr hesi veldugu íløgu, sum tað annars hevði borið til at fingið.

Lítið batnaði tá vit gjørdu Norðurtunnilin. Vit fáa eisini ov lítið burtur úr hesi íløguni.

Nú er so eitt landsstýri aftur av sama slag, sum í áttatiárunum tók eina rætta avgerð í hesum máli. Nú er tí møguleiki fyri at fáa hetta málið upp á beint.

Neyðugt er at broyta ta avgerð, sum tikin var í sambandi við Vestur- og Norðurtunlarnar, og at brúkaragjaldið verður avtikið fyri tey sum nýta hesar farleiðir.

Tað sum letur upp fyri hesum møguleika er at løgtingið hevur samtykt at vit skulu gera Suðurtunnilin. Har kann ein og hvør síggja, at tann frymil, sum higartil hevur verið brúktur, ikki er nýtiligur. Íløgan verður stór, og skulu vit hava brúkaragjald, fara vit at fáa nógv ov lítið burturúr.

Við at avtaka ta ferðsluforðing, sum tunnilsgjaldið er, fara vit at fáa stóran vinning av teimum íløgunum, vit gera. Hetta er ikki bert fyri tey sum búgva handan Vestur-, Norður- og Suðurtunnilin, men eisini fyri øll tey, sum búgva í miðøkinum og hava ein bil!

## Smálomb á vegnum

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ

Av tí at smálombini nú eru farin út á vegin at spæla, heita vit á bilførarar um at seta ferðina niður. Tað er lætt nokk, tí tú skalt bara látast sum um har eru børn á vegnum, ella tú kanst hugsa tær til tann skaða, tú fært á teg sjálvan og bilin, um tú rennur á seyð:

Kunnu tit ikki gera so væl og sleppa speedaranum, tá tit nærkast seyði? Vit hava ongan motorveg í Føroyum, har tú kanst koyra sum tær lystir. Ferðin er framhaldandi max 80 km/t ella at koyra eftir umstøðunum, og tá tjøldur og smálomb ganga á vegnum eru umstøðurnar ikki til at koyra skjótt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.